From: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>
Sent: fríggjadagur, 21. november 2025 18:55
To: Løgting <logting@logting.fo>; Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Djóni Højgaard <Djoni@fmr.fo>
Subject: Viðv. LM-019/2025

Til Løgtingsins fíggjarnevnd

Viðv. LM-019/2025

Sum umbiðið, sendir fíggjarmálaráðið uppskot um skiftisreglu, so at verandi leigubilar ikki vera ávirkaðir av ætlaðu broytingini í meirvirðisgjaldslógini. Tað merkir, at bilar, sum eru skrásettir sum leigubilar fram til 31. des. 2025, framvegis kunnu fáa mvg-frádrátt upp til 60.000 kr. við víðarisølu.

Broytingin verður mett hava avmarkaða fíggjarliga ávirkan og broytir ikki viðmerkingar til uppruna broytingaruppskotið.

§ 2

Gildiskoma og virknaður

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. § 1, nr. 1 er ikki galdandi fyri akfør, sum eru skrásett sum leiguakfør áðrenn 1. januar 2026. Fyri hesi leiguakfør er tær áðurgaldandi reglurnar galdandi.

Viðmerkigar til § 2.

Áseting um gildiskomu og skiftisregla.

Virknaðurin av skiftisregluni er, at leigubilar, skrásettir áðrenn 1. januar 2026, framvegis kunnu verða seldir við frádrátti á í mesta lagi 60.000, treytað av, at akfarið antin hevur havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hevur koyrt í minsta lagi 8.500 km og hevur verið skrásett í minsta lagi 6 mánaðir ella hevur verið skrásett í minst 3 ár.

Vinaliga / Kind regards

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Office: +298 352020
www.fmr.fo